# sbræva-analytikara



*Tórunn Laksáfoss hevur »lænt« eina gentu, fyri at vísa hvussu ABR-massagan gongur fyri seg. Beinta er ikki við í Føroyum hesuferð*

*Modelmynd: Jens Kristian Vang*

- Vit hava sæð eina ótrúliga framgongd, og onkur hevur onkuntíð spurt okkum, hvussu vit kunnu vita, at tað er venjingin, ið hevur ført góðu úrslitini við sær. Hvussu kunnu vit vera vís í, at Beinta ikki hevði ment seg so væl, hóast vit ikki høvdu vant.

- Men eg eri sannførd um, at tá læknin í fyrstuni segði, at hon fór at verða ein grøntsak, so bygdi hann tað á sínar royndir. Hann hevur uttan iva sæð 500 slík børn fyrr, og av teimum hevur eingin ment seg so væl sum Beinta. Tey hava øll verið grøntsakir uttan nakrar førleikar. Og tí kann eg staðfesta, at vit uttan iva hava førkað hana og hjálpt hennara menning við venjingini.

### Forstandinum bagir einki

Tey, ið ikki kenna fólk við heilaskaða, hava ofta skjótt við at døma allan persónin eftir tí, tey síggja við fyrsta eygnakast. Um tað er okkurt galið við kroppinum, um tey ikki fáa tosað, um tey sleva ella um tey ikki fáa farið á wc sjálvi, ja, so er tað uttan iva eisini okkurt galið við forstandinum, sýnist hugburðurin vera. Men tað er langt frá sannleikanum.



*ABR er varligt, systematiskt trýst ígjøgnum tvær bleytar pútur*

*Modelmynd: Jens Kristian Vang*

- Beinta slevar illa og fær ikki gjørt seg skilliga fyri teimum, ið ikki kenna hana. Men hon er samstundis flúgvandi intelligent. Hon ger greið tekin um, hvat hon vil, og hon bæði roknar og lesur langt frammanfyri sín aldur. Venjingin hevur latið heimin upp fyri henni, greiðir Tórunn frá.

Hon leggur afturat, at tey, umframt ABR venjingina, eisini nýta intellegensvenjingina frá Doman háttinum.

Tað er eingin loyna, at Tórunn og maðurin hava vant nógv við Beintu. Heilt nógv. Tey hava verið heilt uppi á 28 tímum av venjing um vikuna. Men er tað veruliga vert at nýta so nógva tíð og orku uppá at venja sítt barn?

Svarið gevur seg sjálvt, tá Tórunn greiðir frá, at Beinta bara hevur ein dreym um ynskistarvið, tá hon gerst stór. Hon vil hvørki vera frisør, pedagog ella prinsessa, sum aðrar gentur. Nei, Beinta ætlar sær tað mest avbjóðandi starvið av øllum. Hon vil analysera virðisbrøv.

*eydna@sosialurin.fo*

## FAKTA

- ABR venjingin kann nýtast til øll við heilaskaða. Venjingarhátturin hevur eisini givið sera góð úrslit hjá fólki við ADHD.
- Tað er aldrin ov seint at byrja at venja, men jú fyrr tú byrjar, jú størri framgongd kanst tú fáa.
- ABR skal venjast heima, og krevur ikki annað enn førleikaskeið, tíð og vilja
- Tað fyrsta sum hendir, er ein asessment tími, har barnið verður mett, og har gjørt verður av, hvussu venjingin skal leggjast til rættis. Hesin tímin kostar umleið 5600 kr. Velur tú síðani at fara víðari og taka av venjingini, so verður henda upphædd mótroknað í endaliga prísinum fyri alt venjingarskeiðið.
- Venjingin í eitt ár kostar umleið 50.000 kr. Við í prísinum eru fýra fundir við vegleiðararnar, umframt leiðbeining í, hvussu tú skalt arbeiða við júst tínum barni.
- Eingin venjing er eins, tí einki brek er eins, og tað er ymiskt júst hvar man skal seta inn, fyri at fáa bestu úrslitini.
- Eitt par úr Belgia og ein russi hava ábyrgdina av ABR venjingini í Danmark.
- Tórunn Laksáfoss fer í næstum at kanna, um føroyskir myndugleikar eru áhugaðir í, at veita heilaskaddum fólki í Føroyum møguleika at venja eftir ABR.
- Um undirtøka er fyri tí, vil hon fegin koma til Føroya at undisvísa foreldrum ella øðrum avvarandi í ABR.
- Um foreldur at trimum ella fýra børnum vísa áhuga fyri venjingini, so kemur Tórunn Laksáfoss fegin til Føroya tvær ferðir árliga fyri sama prís, soleiðis, at familjurnar bert nýtast fara niður tvær ferðir árliga.
- Meiri kann lesast á www.likam.dk ella við at skriva til Tórunn á torunn@likam.dk